# Kristilig humanisma



**UMMÆLI:**
*Kinna Poulsen*



Eftir øllum at døma hevur mjørkin elt meg allan vegin gjøgnum býin og viðarlundina inn í Listasavnið í Gundadali. Her er forhøllin nevniliga full av myndum, sum at síggja til eru eins gráar og tungar og veðrið uttanfyri, ið er alt annað enn jólaligt. Áhugaverd bók er nýliga givin út um avvarðandi listakvinnuna, Sigrun Gunnarsdóttir og um hennara myndir, sum siga søgur, ið vinna, tá tær eru medmenniskjansligar og missa – í øllum førum meg – tá etiski peikifingurin er ov høgt á lofti.

## Forhøllin sum framsýningarhøli

Ikki kann sigast annað enn, at tað gongur fyri seg í Listaskálanum. Umframt ta føstu framsýningina og framsýningina hjá Sigrun Gunnarsdóttir, bjóðar savnið eisini fram eina framsýning við fotomyndum hjá Inga Joensen. Framsýningar- og ikki minst bókaútgávufrekvensurin er kanska hægri enn nakrantíð í Listasavninum, sum hevur givið fýra bøkur út í ár. Tíanverri vinglar góðskustøðið, eisini í teirri føstu framsýningin, sum í løtuni vísir eitt lystiligt bland av amatørlist og yrkislist, har vánalig verk hava sníkt sær inn millum tey góðu. Men hugskotið at brúka forhøllina til framsýningina hjá Sigrun Gunnarsdóttir er ikki so galið, sum tað kundi ljóðað. Í okkara lutfalsliga lítla Tjóðarlistasavni mugu øll høli eyðvitað vera til taks hjá listini og forhøllin riggar hampiliga væl í løtuni, møguliga av tí, at myndirnar hjá Sigrun eru rættiliga uniformar og at tær harvið hanga væl saman sum ein eind.

## Fjart frá hálvabstraktum landslagstulkingum

Hetta er sum so ikki nøkur stór framsýning, men hon gevur tó innlit í samlaða verkið hjá eini listakvinnu, sum í føroyskum høpi hevur sín heilt egna, sermerkta stíl, ið liggur fjart frá teimum vanligu hálvabstraktu, ekspressionistisku landslagstulkingunum. Hetta eru figurativar myndir við frásøguligum innihaldi, sum ofta savna seg um eina ella fáar figurlýsingar. Hesir eru settir á eina bakgrund, ið ofta er grá, uttan nakra serliga perspektiviska dýpd. Málihátturin er einfaldur og sléttur, eins og lutfalsliga lítið verður gjørt burtur úr smálutum og ljós- og skuggaárini. Svarta umhvarvsstrikan kring figurarnar leggur somuleiðis dent á tað óveruliga, flata árinið í myndunum. Summar av myndunum havi eg sæð áður á eitt nú Vár- og Ólavsøkuframsýningum, ella í Ribarhúsi og onkrar eru góðar at síggja aftur, meðan aðrar ikki vinna í øðrum umfari. Hetta er t.d. galdandi fyri tær mongu myndirnar við fostrum og krossum, hvørs naivi, klossuti og dømandi symbolikkur býður hesum ummælaranum beinleiðis í móti.

## Kristilig humanisma

Gleðiligt er tó at staðfesta, at listakvinnan í teimum nýggjaru myndirnar frá í fjør og í ár er farin frá hesum alt ov eintýðuga myndamálinum til nakað meira fleirtýtt og harvið áhugavert, sum restin av ummælinum fer at snúgva seg um. Eitt dømi er myndin "Stórasystir", sum gevur hugasamband til glansbíløtuni, vit fingu í sunnudagsskúlanum, har ein vakur eingil ansar eftir, at børnini sleppa yvirum eina skirvisliga brúgv í øllum góðum. Á modernaðan hátt brúkar listakvinnan hetta hugasambandið til tess at gera áskoðaran varugan við, at veruleikin kanska er eitt sindur meira innviklaður enn í glansbíløtunum. Myndin lýsir ein smádrong og eina eitt sindur størri gentu, sum standa á eini brúgv. Hetta er eitt slag av óvanligum hetjumálarí við sosialum ansi, har hetjuleikluturin verður tillutaður børnum, kvinnum og gomlum. Í hesum førinum er tað stórasystir, ið kann vera ein sjálvsmynd av listakvinnuni, sum sýnist bera álitið. Børnini eru monumentalt plaserað mitt í og frammaliga í myndarúminum. Aftan fyri tey hómast eitt net, ið hongur millum tvær einfaldaðar fjallasíður báðumegin. Børnini tykjast vera á veg til vinstru í myndini, har vit eisini ovast á fjallasíðuni hóma eini hvít hús, ið kundi verið heimið ella ætlaða málið hjá børnunum. Bygnaðurin í myndini er einfaldur og statiskur við teimum báðum børnunum, sum tilsamans mynda eitt óvikandi tryggt pyramiduskap, ið tó púra órógvast av eini manglandi fjøl í brúnni, ið sæst sum ein kolasvartur diagonalur. Á himmalhválvinum sæst eitt merkiligt millumting millum eina sól, ein eingil og eina blómu, sum er prýtt við trettan eygum. Hetta surrealistiska elementið er eyðsæð eitt myndaligt úttrykk fyri einum guddómligum mátti, sum tó tykist fjarur og eygleiðandi, eftir øllum at døma uttan nakra ætlan um uppílegging. Boðskapurin um eginábyrgd her í lívinum er um ikki kollveltandi, so er hann so mikið Kierkegaardskur og humanistiskur, at myndin gerst rørandi.

## Søgan um eina móðir

Sum kunnugt livdi H.C.Andersen um somu tíð sum Kierkegaard og fleiri myndir Sigrun Gunnarsdóttirs taka støði í hansara ævintýrum. Eitt væleydnað dømi er myndin "Kuummiut", sum lýsir eitt smádrong, sum liggur við afturlatnum eygum, eyðsýniliga lívleysur á eini kajakk. Uppi yvir honum hongur netið, sum vit eisini sóu í áðurnevndu mynd og longur uppi hongur ein sera passivur eingil í ringum í hýri. Undir dronginum síggjast fiskar í sjónum, tvey starandi eygu og eitt ur, ið bæði sipa til søguna hjá H.C. Andersen um eina móðir, ið vildi geva alt, eisini eyguni, fyri at barn hennara ikki skuldi doyggja. Kjarnin í søguni byggir á eina kristna tilverufatan, ið snýr seg um at góðtaka deyðan við trúgv og áliti á, at eisini hann gevur meining. Henda sama fatanin er grundarsteinur í at kalla øllum myndunum.